Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

# á skúlagáttini



*F.v.: Borghild Sjúrðarberg, ritstjóri á Føroya Skúlabókagrunni, Lydia Didriksen, lærari og skúlabókavørður, Turið Kjølbro, ritstjóri á Bókadeild Føroya Lærarafelags, Marjun Ziskason, ritstjóri á Føroya Skúlabókagrunni, og Mona Nattestad Steintún, audiologopedur og í starvi á Sernámsdeplinum. Mynd: Jens Kristian Vang*




ymisk viðurskifti, sum gera ein tekst léttan at lesa. Tá talan er um byrjanarlesing, er neyðugt at hugsa um málbólkin. Hvønn verður skrivað til. Hvørjar førleikar og hvørja undanvitan hevur lesarin, og á hvørjum stigi í lesingini er hann. Lættlisnar bøkur eru ætlaðar at fáa glið á lesingina hjá børnum, sum nýliga eru farin at lesa og ikki reiðiliga eru komin í venjing, og annars at stuðla undir lesingina hjá børnum, soleiðis at lesiferðin økist, eins og at lesihugurin verður mentur. Tær eru skrivaðar á einfaldan hátt við stuttum orðum og setningum.

- Í næstum fara vit at heita á føroyskar høvundar um at skriva lættlisnar tekstir til børn. Skal ein skriva ein tekst, ið er lættur at lesa, má ein hava lesiførleikan hjá barninum í huga. Her eru nógv viðurskifti at hugsa um, hvørjar bókstavir og ljóð tú velur, orðamyndir og annað. Avbjóðingin er at fáa tekstin áhugaverdan við hesum skerdu møguleikunum at velja orð.

– Myndirnar hava ikki minni týdning. Meiri enn í øðrum bókum skulu tær stuðla undir tekstin og vera ein hjálp hjá barninum at fata tekstin.

Tær fýra leggja aftrat hesum viðvíkjandi, at tær kundu hugsað sær at komið í samband við fólk, ið hava hug at myndprýða slíkar bøkur.

### Nógvar útgávur á skránni

Gongst sum ætlað, verða í minsta lagi 25 lættlisnar bøkur givnar út um árið. Vónandi fara vit at síggja tær fyrstu upprunaføroysku lættlisnu bøkurnar komandi ár.

- Vit hava nógvar útgávur í umbúna, men alt veldst tó um, hvussu væl skúlarnir taka ímóti teimum. Jú fleiri bøkur verða keyptar, jú fleiri pengar eru til at geva fleiri bøkur út. Tær eru roknaðar sum framíhjálestur, og tí fer eisini at bera til at keypa tær í bókabúðum.

## Fakta

**Torleikastigini eru sjey**

1. stig til 1. flokk,
2. stig til seinnu helvt av 1. flokki og 2. flokk
3. stig til 2. og 3. flokk
4. stig til 4. flokk
5. stig til 4. og 5. flokk
6. stig til 6. og 7. flokk
7. stig til 8. flokk og eldri.

### Tær fyrstu sjey bøkurnar í Krabbarøðini eru:

*Pál ansar kettuni* eftir Jørn Jensen, Hildigunn Niclasen hevur týtt
*Gev mær posan, Rói* eftir Jørn Jensen, Hildigunn Niclasen hevur týtt
*Rói og Sanna* eftir Jørn Jensen, Hildigunn Niclasen hevur týtt
*Reyði bilurin* eftir Knud Hermansen, Hjørdis Heindriksdóttir hevur týtt
*Magnus* eftir Jim Højberg, Alexandur Kristiansen hevur týtt
*Arni og teldan* eftir Rita Bitsch, Alexandur Kristiansen hevur týtt
*Ninna og Kára og nýggj vinaløg* eftir Katrine Marie Guldager, Borghild Sjúrðarberg hevur týtt